

## Møt Frelsaranum

Hevur tú nakrantíð hugsað um, hvat kann veita tær sannan tryggleika og meining við lívinum? Bíblian sigur, at sannur tryggleiki og meining finst einans við at kenna Gud, við at hava samfelag við Hann.

Tann største kærleiksgávan varð givin okkum, tá ið Gud sendi son Sín, Jesus, at doyggja á krossinum. Við at bjóða Honum inn í títt lív og játta Hann sum tín Frelsara, kanst tú av sonnum fáa fyrigeving og frið við Gud, meining við lívinum og lyfti um ævigt lív. (Jóhs.3,16)

Her er ein bøn, ið tú kanst biðja fyri at fáa eitt persónligt samfelag við Gud gjøgnum Jesus Kristus: "Góði Jesus, eg veit, at eg eri ein syndari, og at eg havi verið burtur frá tær. Eg trúgvi, at Tú doyði fyri mínar syndir og uppstóð frá teimum deyðu, og at tú ert tann einasti vegur til Guds. Eg velji at taka ímóti tær sum mín Harra og frelsara. Takk at Tú frelsti meg!"

## Vitnisburður frá tveimum Aglowkvinnum

Í Aglow kenni eg ein hita, sum ger at eg føli meg væl, og kann verða tann eg eri. Tað ger at eg kenni meg trygga í at nýta mínar gávur, sum Guð hevur tillutað mær.

*T.L.*

Føroyar eru stórbærar og bergtakandi. Fjallatindarnir eru so hvassir, at tað kennist sum um at teir skera sær eitt op í Himmalin og inn til Gud.
Føroyar eru ikki bert eitt stað har ein lítil áarløkur tutlar og vakrar blómur vaksa. Føroyar eru eitt merkja stað, og hetta er bæði galdandi fyri náttúruna og atmosferuna.
Henda myndin kann eisini førast yvir á tær føroysku Aglowkvinnurnar. Tað, ið eyðkennir tær er at tær eru sterkar, bergtakandi og fevnandi kvinnur.

*H.B.H, Danmark*

Um tú ynskir at fáa meira at vita um Aglow, kanst tú venda tær til :

AGLOW® INTERNATIONAL

Elisabeth Hvítklett Joensen,
380 Sørvágur
Tel 332036
aglow@kallnet.fo
www.aglow.fo

KREA - TEL 60 80 80

# Aglow er...

## Ein felagsskapur av fevnandi kvinnum.



Mynd: Henriette Bjarne Hansen

AGLOW® INTERNATIONAL



# Endamál okkara er

- At lovsyngja Gudi, at tilbiðja og dýrdargera Hann á øllum økjum í lívi okkara.
- At vinna sálir fyri Kristus, serliga tey, sum ikki kunnu røkkast við vanligari evangelisering.
- At luta gleðiboðskapin um Jesus Krist við trúgvandi um allan heim. Hetta umfatar bæði Jesus sum Frelsara, sum Hann, ið doypir í Heilaga Andanum og Hann, sum loysir og grøðir.
- At virka fyri andaligum einleika millum trúgvandi.
- At eggja hvørja einstaka kvinnu til at gerast virkin í hennara lokalu samkomu/kirkju.
- At fostra felagsskap millum kvinnur.
- At hjálpa kvinnum at finna teirra ávísa leiklut og pláss samsvarandi skriftini.



Mynd: Henriette Bjarne Hansen

# Aglow á heimsstøði

Aglow International er ein tvørkirkuligur heimsumfatandi felagsskapur.

Aglow byrjaði í 1967 í Seattle, Washington, USA, tá ið 4 trúgvandi kvinnur ynsktu at møtast. Til tað fyrsta møtið, sum varð hildið á einum hotelli í býnum, samlaðust fleiri enn 150 kvinnur. Tíðindini um hesi livandi kvinnumøtir spreiddu seg skjótt, og fleiri bólkar sóu dagsins ljós. Og er tað nú spreitt út í meira enn 170 londum um allan heim. Aglow røkkur út til allar kvinnur uttan mun til húðalit, aldur, mentan ella trúgv. Á henda hátt verða familjur um allan heimin náddar.

Í Føroyum eru 5 Aglow bólkar og 1 landsleiðsla, og hvør bólkur hevur mannligar ráðgevarar. Hetta eru prestar ella leiðarar, sum viðurkenna, at Aglow hevur eitt pláss í Guds kirkjuliði. Teirra ábyrgd er at veita ráð og stuðul til stýrini.



# Aglow lokalt

## - Ein opin favnur til tín

Í einum Aglow- bólki ber til at fáa tað, sum er torført at finna í einum strongdum gerandisdegi: uppmuntrandi vinarlag, umsorganarfull hjørtu, oyru sum lurta og eina kenslu av at hoyra til.

Í Aglow finnur tú eisini tryggar karmar, har tú á ein góðan máta kanst læra um Gud og saman við øðrum kvinnum veksa í trúnni á Hann, og fáa eina viðvarandi broyting í tínum lívi.

*Verið brennandi í Andanum—tænið Harranum!*

Rómverjabrævið 12.11.